PERISKOP
FORUM FOR KUNSTHISTORISK DEBAT

Periskop: Forum for kunsthistorisk debat

Nr. 32, 2024

“Føroysk listasøga í dag”

Heiti: “Mótmæli, maska, unglingur, verkfall: Eitt sindur um, hvussu eg valdi verkini eftir Janus Kamban”

Høvundur/høvundar: Jóhan Martin Christiansen

Blaðsíðutal: 74-79

Dagfesting: 31.10.2024

DOI: 10.7146/periskop.v2024i32.150461



JÓHAN MARTIN CHRISTIANSEN

# Mótmæli, maska, unglingur, verkfall

## Eitt sindur um, hvussu eg valdi verkini eftir Janus Kamban

Februar 2016. Eg eri júst fluttur inn í atelierhúsið, sum myndhøggarin Janus Kamban (1913-2009) læt myndlistafólkum og rithøvundum í sínum testamenti. Her fari eg í holt við mína komandi soloframsýning á Listasavni Føroya, sum letur upp í septembur. Tíðin í tí háloftaða húsinum har við endan á grannalagnum við raðhúsum og smølum vegum frá 50'inum kendist kollveltandi fyri meg bæði sum menniskja og listafólk, men eisini tí at ókend bridgi í menniskjanum og listamanninum Janusi Kamban opinberaðu seg fyri mær. Hetta komi eg aftur til seinni.

Janus Kamban er klassiskt útlærdur myndhøggari á kunstakademiinum í Keypmannahavn hjá professaranum Jørn Utzon Frank. Hann er mest kendur sum listamaðurin, sum hevur lýst siðbundin, føroysk motiv so sum seyðin og sjólívið við sínum elegantu og tøttu úttrykkum. Hann er eisini kendur fyri síni frálíku, einkultu grafisku prent, sum suma inn á nátturuna, gerandisdagin á bryggjuni o.s.fr.

Tað kann ikki sigast, at leikluturin hjá Janusi Kamban í føroysku listasøguni er undirmettur, harafturímóti er hann ein lyklapersónur bæði sum listamaður, stigtakari og fasilitator, stjóri á Listasavni Føroya og sum virkin kjakari. Kamban skrivaði til dømis greinar um list, átrúnað, politikk og samfelagsviðurskifti. Men har eru síður av lívinum hjá Kamban, sum kanska ella kanska ikki tilvitað eru tónaðar niður, ella hava tey, ið skrivaðu kanonina, heilt einfalt ikki havt áhugað í hesum síðunum. Tær hava hvørki passað inn í myndina av føroyskari list ella í tað konservativa samfelagið, sum tá var í Føroyum.

Tað var á bókasavninum hjá Kamban, at eg bar eyga við ein listamann við einari radikalt øðrvísi position enn tí, sum eg vanliga hoyrdi endurfortalda um listamannin. Á bókahillunum stóðu bøkur um tann stóra heimin, um samfelagið, søgu og líknandi viðurskifti, men eisini fagrar og yrkisbókmenti um kroppin og seksualitet. Bøkur, sum høvdu krossað mín veg eitt heilt annað stað í lívinum; bøkur, sum vit lósu í miljønum kring gjeikarakollektivið á Vesterbro, har eg búði eitt áratíggju. Hetta vóru ikki bøkur, sum eg knýtti at einum lítlum listamannahúsi í Tórshavn.

Tey verkini, sum eg havi valt, eru ikki sýnd fram ofta. Hetta eru verk, sum víkja frá teirri klassisku frásøgnini í føroyskari list um útróður ella náttúru, tí tey peika á søgur, sum ikki endiliga hava fingið varpað ljós á seg. Vit síggja ein mann, sum mómælir, ein hóp í verkfalli, unglingar við bóltum og ein trølsligan figur, sum heldur einari masku – kanska ein sjálvsmynd sum eitt janusarhøvuður. Akkurát her liggur kanska ein lykil til eina størri og fjølbroyttari fatan av menniskjanum og listamanninum Janusi Kamban. At umvegis hesi verkini kunnu vit vónandi bera eyga við tær søgurnar, verkini, sum ikki hava fingið so nógv ljós á seg áður. Verkini, sum hava uppiborið at verða sýnd fram, sædd, miðlað, tulkað til fyrimuns fyri eini breiðari fatan av tí, sum føroysk listasøga í grundini er, at sjómenn og kvirlív kunnu standa lið um lið.

Hóast eg ongantíð hitti Janus, so havi eg umvegis hesar nýuppdagingar og lesingar av hansara praksis brádliga funnið ein nýggjan allieraðan í teirri føroysku listasøguni – ein listasøga, sum spakuliga flytir seg úr eintali í fleirtal.

*Føroyskað hevur Beinir Bergsson*




Janus Kamban, ókent heiti (menn við konteynara) ca. 1976. Foto: Ole Wich, avmyndað av Jóhan Martin Christiansen.




Janus Kamban, ókent heiti (drongur við bólti), síðst í 1980unum. Foto: Ole Wich, avmyndað av Jóhan Martin Christiansen.



Janus Kamban, ókent heiti (ungur maður við bólti), fyrst í 1980unum. Foto: Ole Wich, avmyndað av Jóhan Martin Christiansen.




Janus Kamban: ókent heiti (protestfigurur), 1980unum. Foto: Ole Wich, avmyndað av Jóhan Martin Christiansen.




Janus Kamban: ókent heiti (figurur við masku), ca. 1983. Foto: Ole Wich, avmyndað av Jóhan Martin Christiansen.